## Ov lítil CO2-skerjing

ST kunngjørdi í gjárkvøldið, at 55 lond hava kunnað heimsfelagsskapin um, hvussu nógv tey ætla sær at skerja útlátið av CO2 hetta til 2020. Sagt verður, at 78 prosent av heimsins CO2-útláti kemur frá teimum 55 londunum. Formaðurin í veðurlagsnevndinmi hjá ST, Yvo de Boer, sigur, at tilsagnirnar frá londunum eru ikki nøktandi. Hinvegin heldur hann, at tær eru eitt týðandi stig og geva eina ábending um, at eitt veruligt úrslit kann koma burtur úr næsta samráðingarumfari, sum verður í Meksiko.



## Kina ávarar Obama

Teir seinastu dagarnar hevur Kina átalað, at USA ætlar sær at selja Taiwan nútímans hernaðarútgerð, og stjórnin í Beijing hevur hótt við avleiðingum. Nú er kinesiska leiðslan komin við einari ávaring afturat. Nú ávarar hon Barack Obama, forseta ímóti at tosa við tann andaliga leiðaran úr Tibet, Dalai Lama. Stjórnin í Beijing sigur, at tað fær álvarssamar avleiðingar fyri viðurskiftini millum Kina og USA, um Obama játtar at hitta Dalai Lama. Tann fyrsta viðmerkingin úr Washington er, at enn er eingin tílíkur fundur avtalaður.

# Herða reglurnar um arbeiðsloyvi



*Savnsmynd*

**Av tí at arbeiðsloysi í Føroyum er farið upp um 3,5%, koma herdu reglur um arbeiðsloyvi aftur í gildi**

ARBEIÐSLOYSI
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Danska Integratiónsministeriið hevur nú sett úr gildi serligu reglurnar frá juni 2008, sum gjørdu tað lættari hjá ES-borgarum at fáa arbeiðsloyvi í Føroyum, enn eftir vanligu útlendingalógini fyri Føroyar. Stigið er tikið í samráð við Innlendismálaráðið, grundað á at arbeiðsloysið í Føroyum nú er farið upp um 3,5%.

Útlendingastovan boðar frá, at fyri tey, ið hava nýtt skipanina, er hetta nú galdandi:

Eitt arbeiðsloyvi, ið er er givið undir serligu skipanini fyri ES-borgarar, hevur framvegis gildi, til tað er gingið út.

Allar umsóknir, latnar myndugleikunum áðrenn 27. november 2009, verða viðgjørdar eftir serligu reglunum fyri ES-borgarar, sum var galdandi tá.

Allar umsóknir frá ES-borgarum, latnar myndugleikunum eftir 27. november 2009, verða viðgjørdar eftir vanligu útlendingalógini fyri Føroyar (Anordning nr. 182 af 22. marts 2001).

Undangóðkendir arbeiðsgevarar kunnu nú ikki longur fráboða nýsetan av ES-borgarum við AR8 skjali, tí nú krevst aftur, at øll hava persónligt arbeiðsloyvi.

Danska Udlændingeservice hevur kunngjørt, at tey skjótast møguligt senda kunning um broytingina til undangóðkendar arbeiðsgevarar, fakfeløg, arbeiðsgevarafeløg og aðrar avvarðandi partar.

Innlendismálaráðið sigur, at kunnað verður samstundis um, hvørji umsóknarbløð teir arbeiðstakarar, ið raktir eru av broytingini, skulu nýta, um tey framvegis ætla at søkja um loyvi at arbeiða í Føroyum.

# Kvinnurnar trívast verri í politinum

**Trivnaðarkanningin í politinum vísir, at í Føroyum eins og í ríkinum sum heild trívast kvinnurnar verri enn menninir**

TRIVNAÐUR
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*




Líka aftur til 2005 hava trivnaðarkanningarnar , sum gjørdar eru millum starvsfólk í politinum, víst, at kvinnurnar hava verið betur nøgdar við arbeiði sítt enn menninir.

Í 2007 og í 2008 var tó minni munur.

Men í fjør fóru kvinnurnar afturum. Tølini vísa, at kvinnurnar trívast væl verri enn menninir, og tað er galdandi bæði fyri Føroyar og ríkið sum heild.

Einki verður viðmerkt um, hvat kvinnurnar eru mest ónøgdar við.

# Svimjiskúlin á ráðstevnu í Noreg

**Trý umboð fyri Svimjiskúla Føroya hava í vikuskiftinum verið á norðurlendskari ráðstevnu í Asker nær Oslo, har grundleggjandi svimjifrálæra var evnið**

SVIMJING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



Nordic Conference in Elementary Swimming Teaching er árlig ráðstevna um grundleggjandi svimjifrálæru, sum í nú 10 ár hevur verið fyriskipað á skift í ymiskum Norðanlondum, við svimjisambandinum í vertslandinum og Nordic Education Group sum samskiparar. Málbólkurin er svimjivenjarar og lærarar sum fáast við grundleggjandi svimjifrálæru og lívbjarging, har innihaldið í ár til dømis var spurningurin um nýtslu av flótiamboðum í svimjiundirvísing, og frálæra til børn við breki.

Svimjiskúli Føroya er samstarv millum Mentamálaráðið og Svimjisamband Føroya, at fáa til vega skeiðstilboð til svimjilærarar og venjarar í føroyskum fólkaskúlum og svimjifeløgum. Í løtuni kann Svimjiskúlin bjóða skeið í vatntilvenjing og svimjigreinunum, umframt at fólk gjøgnum skipanina kunnu fáa lívbjargingarprógv. Ætlanin er seinni at víðka um Svimjiskúlan, við frálæru eisini í venjingarlæru og líknandi, so hvørt sum orka verður til tess.